## Teir smærru AWI-bátarnir

AWI-BÁTAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

### 4-mannafarið

4-mannafarið er upprunaliga bygt eftir føroyskum mynstri, er vælegnað sum frítíðarbátur, bæði til motor og segl. Báturin hevur sitipláss á trimum bekkum, umframt framman og aftan. Báturin kann útgerast við róðri, árum, brunni, lensipumpu og stálskinnara.

Longdin er 6 metrar, breiddin 1,68 metrar og dýpdin er 0,30 metrar.

### AWI 570



AWI 570 er ein skjóttgangnadi jolla ella bátur við einum serligum skapi, sum tryggjar sera góðan stabilitet og lastaevni. Jollan er vælegnað sum frítíðarbátur og vinnubátur. Møguleiki er fyri at el-drivnum línuspæli til rúsur og línu. Eisini ber til at hava fiskakassar á dekkinum. AWI 570 hevur tvey sitipláss aftan og tveir stólar framman – alt eftir, hvat keyparin ynskir. Jollan kann eisini byggjast við stýrihúsi ella við vindspegli. Goymslurúm er undir bakkanum framman. AWI 570 er góðkendur av Det norske Veritas til at lasta 1180 kilo.

Longdin er 5,70 metrar og breiddin 2,20 metrar.

### AWI 27



AWI 27 verður fyrst og fremst nýttur til vinnuligan fiskiskap, men verður av mongum nýttur sum stuttleikabátur. Dekkið er rúmligt í mun til bátastøddina og kann uppskottast í fleiri pavnar. Pláss er fyri 4 snellum. Við línuspæli og línum eru 12-14 stampar hóskandi. AWI 27 lastar 3000 kilo. Lugarið er innrættað við V-formaðari sofu, ið eisini kann nýtast sum tvær koyggjur. Í stýrihúsinum, sum er bjálvað og hevur rútar úr herdaðum glasi við aluminiumsrammum, er gott útsýni. Báturin verður bygdur sambært galdandi reglum frá Skipasýninum - og til Grønlands eisini sambært "KIS rekommandationer", sum krevur ísstyrking av eitt nú skrokkinum.

Longdin er 8,12 metrar, breiddin 2,50 og dýpdin er 1 metur.

### AWI 28

AWI 28 hevur sama skrokk sum AWI 27. Báturin verður bæði nýttur sum alibátur og sum útróðrarbátur. Stýrihúsið aftan gevur eitt stórt og rúmligt dekk, sum eisini er slætt soleiðis, at gjørligt er at hava stór kør, plattar og annað á dekkinum. Í stýrihúsinum er stýristólur og u-formaður bonkur, sum eisini kann nýtast sum tvær koyggjur. Úr stýrihúsinum er gott útsýni. Báturin kann leverast við bjálvaðum stýrihúsi og hitablásara. AWI 28 lastar umleið 3000 kilo.

Longdin er 8,30 metrar, breiddin 2,50 metrar og dýpdin er 1 metur.

# AWI-Boats byggir til Grø



*Póllendingar eru óførir at stoypa bátar*

**Á glastrevjavirkinum, AWI-Boats í Runavík, hava teir nógv at gera í løtuni. Fýra nýbygningar skulu latast til Grønlands um nakrar vikur, onkur bátur skal leingjast, og aðrir verða umvældir**

AWI-BOATS
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinnapartin mánadagin vitjaði Sosialurin inni á glastrevjavirkinum hjá AWI-Boats í Runavík, har rættiliga nógv er at takast við í løtuni, bæði við nýbygging og umvælingum.

Bátavirkið byggir í løtuni fýra útróðrarbátar til eitt felag í Sisimiut í Grønlandi; tveir 33 fóts bátar og tveir 35 fóts bátar, sum skulu latast seinni í mai mánaða.

Aðalstein Anthoniussen sigur, at allir fýra bátarnir verða útgjørdir til toskafiskiskap – við snellum, línuspæli og garnaspæli. Tað er Oilwind í Miðvági, sum letur snellur og spøl.

- Ætlandi verða bátarnir fluttir yvir til Grønlands við øðrum skipi, tí tað er heldur tíðliga upp á árið at sigla teir yvir.

Hann sigur, at bátarnir væntandi fara úr Føroyum eftir fiskivinnustevnuna, sum verður í høvuðsstaðnum í mai.

AWI-Boats verður við á fiskivinnustevnuni, og ætlanin er at hava ein av hesum bátum liggjandi í Havn, meðan stevnan verður hildin.

AWI-Boats hevur gjøgnum árini havt nógvar sáttmálar um nýbygging av bátum til Grønlands, og hetta snýr seg um flest allar bátastøddir – heilt frá jollum, um 23 fóts AWI-bátar til stórar útróðrarbátar, sum hesar, ið nú fara yvir til Sisimiut.

Aðalstein sigur, at AWI-




*Aðalstein Anthoniussen byrjaði at byggja bátar úr glastrevju longu í 1971*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Ungur maður í holt við at seta motor í e*